

# Skrivstovufólk

Søkt verður eftir fólki til skrivstovu okkara at arbeiða hálvan dag.

Arbeiði fevnir um allar vanligar skrivstovuuppgávur, so sum kassauppgerð, bókingar o.s.fr. Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur royndir innan skrivstovuarbeiði. Tað er ein fyrimunur, at umsøkjarin kennir til Navision bókhaldsskipanina.

Umsóknarfreistin er tann 20.10.2006. Starvið verður sett skjótast tilber. Eru spurningar hesum viðv., ber til at ringja til okkum á tlf. 353897 og spyrja eftir Gunnvør, ella maila til gunnvor@jogvan-weihe.fo

Umsókn við møguligum prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til:

***P/f Jógvan Weihe***
*Stiðjagøta 10*
*Postsmoga 1008*
*110 Tórshavn*

**P/f Jógvan Weihe**
Heil- og smásøla

Stiðjagøta 10 • Boks 1008 • FO- 110 Tórshavn
Telefon 35 38 97 • Fax: 35 38 98
jogvan-weihe@jogvan-weihe.fo • www.weihe.fo



## Byggifrøðingur [endurlýsing]

Tórshavnar kommuna stendur í løtuni fyri nógvum áhugaverdum verkætlanum og anleggsarbeiðum, og tískil søkja vit eftir einum nýggjum starvsfelaga, ið saman við starvsfeløgum og ráðgevandi vinnuni hevur hug og dirvi at føra hesar spennandi uppgávur út í verki.

**Arbeiðsuppgávurnar**
eru m.a. at gera uppskot og kostnaðarmetingar í sambandi við vegarbeiði umframt at standa fyri projektering, útbjóðing, eftirlit og byggirokniskapi, sum kommunan stendur fyri.

**Vit ynskja**
at tú hevur útbúgving sum byggifrøðingur ella líknandi og hevur góðar arbeiðsroyndir og royndir innan almenna fyrisiting, ið samanlagt geva neyðugan førleika at røkja starvið. Tað er ein fyrimunur at hava kunnleika til telduforritini, ið hoyra til Microstation, Microsoft Officepakkan og Navision Attain. Neyðugt er, at tú hevur koyrikort.

**Persónligir eginleikar**
Vit ynskja, at tú ert røkin, gongur undan í at menna tænastustøðið og dugir væl at fara við starvsfeløgum og viðskiftafólki. Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt, kunna taka avgerðir og duga væl at málbera teg í skrift og talu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Boða Haraldson, býarverkfrøðing, ella Janus Isfeldt, deildarleiðara, tlf. 302010.

**Umsóknir**
saman við viðmælum, avrit prógvum o.t. og upplýsing um royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 27. oktober 2006. Viðmerkið umsóknina „Byggifrøðingur til teknisku deild".

Tekniska deild hevur 12 starvsfólk í arbeiði og heldur til í posthúsbygninginum saman við byggi- og býarskipanardeildini. Arbeiðsøkið hjá teknisku fyrisitingini er mangt annað at viðgera byggimál, útstykkingarloyvi umframt at standa fyri planlegging, projektering og viðlíkahald av øllum kommunalu vegunum og tekniskum veitingum, ið kommunan hevur ábyrg av. Harumframt hevur tekniska deild sum høvuðsuppgávu umsiting av heilsu- og umhvørvismálum.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**

## Geymar



| | | |
|---|---|---|
| **Sandisk USBdisk 512Mb** .......... | **kr.** | **275,-** |
| **Sandisk USBdisk 1024MB** ........ | **kr.** | **375,-** |
| **Sandisk USBdisk 2048MB** ........ | **kr.** | **675,-** |
| **Sandisk USBdisk 4096MB** ........ | **kr.** | **1.375,-** |

**SpF Teldu Tænastan**
**Telefon: 317620 • Telefax: 317699 • Heimasíða: www.tt.fo**

## Norðoya Javnaðarfelag

Útsetti aðalfundurin verður í Skálanum í Klaksvík mikukvøldið 18. oktober kl. 19.30.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

## Reingerð

Starv sum reingerðarfólk hjá politinum í Havn er leyst at seta 1. november 2006.

Arbeiðstíðin er 15 tímar um vikuna. Tríggjar tímar hvønn dag, frá mánadegi til og við fríggjadegi.

Løn verður veitt eftir galdandi sáttmála við fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast á politistøðini við at venda sær til Halldis Poulsen, skrivstovuleiðara á telefon nr. 35 14 48, lokal 2100.

Umsóknir um starvið skulu latast inn áðrenn 25. oktober 2006.

**Føroya Landfúti, tann 6. oktober 2006**

Karen Marie Olesen

## Til sølu

Tvey hús á Tvøroyri til sølu.

**Tlf. 0045 31257797**

**Arbeiðshandskar**
*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*
Beinleiðis frá framleiðara
**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar
**ADC-Heilsølan** spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo
Sosialurin 311820